**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 4 |
| Tíð: | 25-05-23 klokkan 14:00 – 15:00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Petur Rouch, skrivari, og Robert Vilhelmsen, næstformaður.

**Fundarskrá:**

1. Fundarfrágreiðing # 4
2. Fundur við borgarstjóran 13.06.23
3. Fyrireiking til Eldradagin 2023
4. Ymiskt

AD 1 Fundarfrágreiðing # 4

Fundarfrágreiðin #4 2023 varð lisin og góðkend.

AD 2 Fundur við borgarstjóran 13.06.23

Fundur verður við borgarstjóran 13. juni klokkan 14:00.

Til fundin hava vit sett á skrá:

**Hvat kann TK gera fyri at bøta um korini hjá eldri borgarum, sum ikki eru røktarkrevjandi.**

Her er talan um:

A: Heilsustrimbandi titøk fyri eldri.
B: Bøta um búðstaðarneyðina hjá eldri borgarum.
C: Mótrokning hjá pensjónistum í fólkapensjónini.
D: Ein betri virkandi bussleið.

Í viðtøkunum fyri Eldraráðið stendur í §2

*Stk. 2: Býráðið eigur at spyrja Eldraráðið um tað, sum viðkemur teimum eldru.*
*Stk. 3: Einstøku byráðsnevndirnar samskifta við Eldraráðið í málum, sum hava við teirra málsøki at gera.*

Ongantíð enn hevur Eldraráðið verið biðið um at úttala seg um nakað sum helst.

Í viðtøkunum §6 stk. 4 stendur:

*Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt ein mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fundir undir 3 tímar.*

Hetta verður ikki fylgt, tí samsýning verður bert latin, um limir hava verið á regluligum fundi ella fundum avvarðandi mánaða. Vit mæla til, at orðingin verður broytt, so at fólkavaldir limir fáa samsýning, tá fundir verða hildnir.

AD 3 Fyrireiking til Eldradagin 2023

Á eldradegnum 2023 skjóta vit um at hava somu skrá sum á fundinum við borgarstjóran. Tey luttakandi eiga at vera umboð fyri býráðið, sum vera – kann ein siga – í andglettinum. Men umframt eiga at luttaka umboð fyri Landsfelag Pensjónista og umboð fyri Landsstýrið. Og umframt hesi nevndu umboð, serfrøði uttanfyri politisku skipanina og kompetentur orðstýrari. Og so sjálvandi lættari undirhald og matartilboð.

AD 3 Ymiskt

Næsti fundur verður stuttfundur týsdagin 13. juni 2023 klokkan 13:30 í Tilhaldinum, tá vit fyrireika fundin við borgarstjóran klokkan 14:00.

Fundur lokin klokkan 15:00

Tórshavn 25.05.2023

Petur Rouch,
skrivari